UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, tann 23. februar 2024
J. nr.:
Viðgjørt:
Tygara skriv:

**Reglugerð fyri stuðul til umhvørvisverndartiltøk**

**Endamál**
**§ 1** Reglugerðin ásetir treytir fyri stuðulsveiting av konto 18.30.1.01. Stuðul til umhvørvisverndartiltøk.

*Stk. 2.* Endamálið við játtanini er at stuðla verkætlanir, sum:
- menna vitanina um umhvørvið og náttúru
- virka dálkingarfyribyrgjandi og -avmarkandi
- verja landsløg, djóra- og plantusløg
- kunna almenningin um umhvørvis- og náttúruviðurskifti
- stuðla undir orkusparandi tiltøk.

**Stuðulstreytir**
**§ 2** Helvtin av stuðlinum er ætlaður til arbeiðið ella verkætlanum knýtt, at Ramsar-oyggjunum Nólsoy, Skúvoy og Mykinesi. Annars kann stuðul veitast einstaklingum, virkjum, feløgum og kommunum. Stuðulin skal í minst møguligan mun virka kappingaravlagandi.
*Stk. 2.* Umhvørvismálaráðið kann krevja upplýsingar um og innlit í arbeiðsgongdina, og hvussu peningurin verður nýttur í verkætlanarskeiðinum.
*Stk. 3.* Umsøkjarar, sum hava fingið tilsøgn um stuðul, skulu í seinasta lagi 1 mánaða eftir, at tilsøgn er móttikin, geva Innlendismálaráðnum skrivlig boð um, hvørt stuðulin verður nýttur ella ikki.
*Stk. 4.* Er ikki av álvara farið undir arbeiðið, sum hevur fingið játtað stuðul, innan eitt hálvt ár eftir, at stuðulin er játtaður, fellur tilsøgnin burtur.
*Stk. 5.* Stuðulstilsagnir eru galdandi til 31. desembur í stuðulsárinum, sum merkir at stuðul sum ikki er nýttur, fellur burtur. Í heilt serligum førum kann tilsagnarfreistin verða longd við upp til 4 mánaðir eftir árslok.
*Stk. 6.* Roknskapur verður latin Umhvørvismálaráðnum, saman við frágreiðing um úrslitið av verkætlanini, tá verkætlanin er liðug, ella í seinasta lagið 20. februar eftir lokið fíggjarár. Roknskapurin skal greitt útgreina hvussu stuðulin er nýttur, samanber eisini § 5.

**Serligar verkætlanir**
**§ 3** Tá ið Umhvørvismálaráðið metir tað vera átrokandi, at heilt ávísar verkætlanir verða framdar, kann aðalráðið seta í verk hesar verkætlanir við fígging av játtanini til umhvørvisverndartiltøk.
*Stk. 2.* Tá ið Umhvørvismálaráðið setur í verk verkætlanir, kann tað gerast við almennari lýsing í fjølmiðlunum, ella við beinleiðis samskifti við serfrøðingar.

Gongin 7 • FO-100 Tórshavn
Tel. (+298) 35 87 00 • umhvorvi@umhvorvi.fo • www.umhvorvi.fo

**Umsókn**
**§ 4** Umsóknir um stuðul skulu vera Umhvørvismálaráðnum í hendi til lýstu freis. Lýst verður á heimasíðuni hjá Umhvørvismálaráðnum www.umhvorvi.fo.
*Stk. 2.* Verður øll játtanin ikki nýtt í fyrsta umfari, verður lýst eftir fleiri umsóknum við nýggjari umsóknarfreist.
*Stk. 3.* Umsóknir skulu skrivast á **oyðublaðið** "Umsóknarblað til stuðul av játtanini til umhvørvisverndartiltøk", sum er tøkt á heimasíðu ráðsins. Aðrar viðkomandi upplýsingar fyri umsóknina og verkætlanina kunnu leggjast við sum fylgiskjøl til umsóknarblaðið.

**Roknskapur og útgjald**
**§ 5** Stuðulin verður latin sambært treytunum í hesu reglugerð og játtanarlóg landsins. Stuðulin verður útgoldin sambært rokning, fyribils verkætlanarroknskapi ella endaligum roknskapi frá grannskoðanarvirki.
*Stk. 2.* Er talan um stuðulsupphæddir omanfyri kr. 400.000,- til sama stuðulsmóttakara, skal roknskapurin verða grannskoðaður. Lønarútreiðslurnar skulu verða sundurgreinaðar.
*Stk. 3.* Er talan um verkætlanir niðanfyri kr. 60.000,- skal ein fíggjarlig uppgerð gerast sambært meginreglunum fyri vanligan roknskap og frágreiðing gerast um úrslitið av verkætlanini.

**Gildiskoma**
**§ 6** Henda reglugerð kemur í gildi tann 23. februar 2024.
*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi reglugerð fyri umhvørvisverndartiltøk frá 27. mars 2023.

Umhvørvismálaráðið, 23. februar 2024

Ingilín

Ingilín D. Strøm
landsstýriskvinna

Pól Egholm
aðalstjóri